


# Friðarlig ólavsøka

Av løgreglustøðini í Havn siga tey, at tað hevur verið ein stak friðarlig ólavsøka. Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at løgreglumenninir hava havt lítið at gera:

– Tað hevur verið nógv smávegis, sum hoyrir til, tá ið so nógv fólk eru samlað. Nógv eru sera full. Summi eru stein í ørviti, so rúsað tey eru.

– Meginparturin av tíðini koyrdu vit full fólk heim. Vit hava umleið 60 síður av frágreiðingum, so tað er ikki heilt lítið. Men einki álvarsligt er hent, og tað er einans at gleðast um, sigur vakthavandi.

# Ungur drongur átti allan harðskapin

Skaðastovan hevði 49 útrykningar, og í flestu førum vóru tað ávirkað fólk, sum vóru dottin og høvdu fingið smærri snuddir.

– Tað vóru fýra harðskapsmál, og øll vóru framd av sama persóni. Tað var ein 16 ára gamal drongur, sum eisini hevði treytaðan dóm frammanundan. Nú var so nóg mikið, og tí er drongurin framstillaður til grundlógaravhoyring fyri sjey sakir fyri stongdum hurðum í dag. Tí fái eg heldur ikki sagt meira um hetta málið, sigur vakthavandi.

– Annars vóru 8 mál um herverk. Tað hevði ikki so nógv uppá seg. Eisini her var tað ein frustreraður maður, sum hevði gingið runt og framt herverk. Maðurin er nú búraður inni inntil miðjan august.

## Reypaði seg í geglið

Tað vóru sjey fólk tikin fyri rúsdrekkakoyring á ólavsøku. Harav vóru tvey orsøk til ferðsluóhapp.

28. juli kl 6.50 koyrdi ein maður ávirkaður. Hann rendi í ein hýruvogn og rann avstað. Løgreglan visti, hvør maðurin var, men hann goymdi seg. Seinni fortalaði maðurin seg, tá ið hann hevði reypað fyri einum vinmanni um bragdið hjá sær. Ein løgreglumaður, sum ikki var til arbeiðis stóð nær hjá og hoyrdi alla søguna, og hann boðaði vakthavandi frá. Síðani varð maðurin tikin, og ein blóðroynd varð tikin.

Tann 29. juli kl 20.50 rendi ein kvinna á ein parkeraðan bil. Ein annar løgreglumaður, sum hevði frí, sá tilburðin og boðaði frá. Kvinnan var sera ávirkað.

Í morgun kom ein bilur í land frá Norrønu. Viðkomandi luktaði sera illa, og hann blásti promilluna heilt upp á 1,6. Hann hevur allarhelst drukkið seg fullan umborð. Viðkomandi situr nú í varðhaldinum.

## Húsaófriður í Havn

Friðarliga ólavsøkan bjóðaði ikki uppá nakað álvarsligt mál hjá løgregluni.

Hóast hetta, eru altíð tey vanligu málini, sum altíð eru til stevnur og tílíkt. Nógv høvdu veitslu heima í egnum húsum, og tá er onkur ósemja komin í onkustaðni.

– Onkrar fráboðanir hava verið um húsaófrið. Slíkar fráboðanir fáa vit altíð á ólavsøku. Tað er ikki altíð so álvarsligt. Tað eru kanska tveir hjúnafelagar, sum eru vorðin ósamd, og so hevur annar hótt hin. Men tílíkt hevur mestsum ongantíð harðskap við sær, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

## Átta svóvu rúsin av sær

Á ólavsøku eru nógv full fólk á gøtunum, og summi høvdu fingið ov nógv niðurum. Løgreglan hevði úr at gera við at koyra ávirkað fólk til hús. Átta svóvu rúsin av sær á støðini.

– Tað eru nógv full fólk á ólavsøku, og átta av teimum svóvu á støðini. Annars royna vit altíð at sleppa undan, at fólk sova á støðini, um tey hava onkrastaðni at fara. Tilsamans fingu vit 44 fráboðanir um ávirkaðið fólk.

– Vit hava eisini koyrt nógv fólk til hús.




Shell søkir eftir nýggjum leiðara til tær báðar Shell-støðirnar í Havn
- við Norðara Ringveg og á Frælsinum.
Leiðarin hevur fulla ábyrgd
av dagligu leiðsluni og rakstrinum av Shell-støðunum
Talan er um eitt avbjóðandi, ábyrgdarfult og sjálvstøðugt starv,
har tann rætti persónurin hevur góðar møguleikar at seta sín egna
dám á tær báðar støðirnar í samstarvi við leiðsluna hjá Føroya Shell.

**Vit ynskja ein persón, sum er royndur innan handil og annars hevur hesar eginleikar:**

- ✔ Leiðslusinnaður
- ✔ Ágrýtin
- ✔ Tænastusinnaður
- ✔ Fleksibul
- ✔ Samstarvssinnaður
- ✔ Álítandi
- ✔ Jaligur og opin
- ✔ Røkin

Løn sambært avtalu

Áhugað kunnu venda sær til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 347400 ella fartelefon 216899.

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði og skulu í seinasta lagi mánadagin 21. august 2006 sendast til

Føroya Shell
Viðarnes
100 Tórshavn
att.: Erling í Liða

www.shell.fo

SISERO 351800